## Mærsk stórt hall í fjør



Danska stórfyritøkan A.P. Møller-Mærsk hevði eitt stak vánaligt ár í fjør. Roknskapurin, sum varð lagdur fram í dag, vísir, at felagið hevði 5,5 milliardir krónur í halli í 2010 samanborið við 17,5 milliardir krónur í avlopi árið fyri. Umsetningurin minkaði 36 milliardir krónur. Tað er serliga bingjudeildin, sum tyngir raksturin. Hon hevði 11 milliardir krónur í halli í fjør ímóti smáum trimum milliardum krónum í avlopi í 2009. Leiðslan í A. P.Møller-Mærsk væntar, at raksturin í ár fer at geva eitt lítið avlop.

## Nýggir møguleikar fyri foreldur hjá børnum við breki

Í døgunum frá 10. – 13. mars kemur Larz Thielemann aftur til Føroya at halda fyrilestrar fyri foreldrum og fakfólki. Eisini bjóðar hann viðtalur til foreldur hjá børnum við heilaskaða. Í samstarvi við Javna kemur Larz Thielemann, nervapraktikari, til Føroya at hava viðtalur fyri foreldur at børnum við øllum sløgum av menningartarni. Viðtalurnar verða í hølunum hjá Javna við Hoydalsvegin 40. Eisini fer hann at halda fyrilestur um heilaskaða, har hann eitt nú viðger spurningin um heilaskaði kann lekjast, og um tað finst nakar veruligur valmøguleiki til vanligu viðgerðina.

# Smíðlist stór arbeiðir fyri framman



*Meðan byggivinnan sum heild kærir sína neyð, tí ov lítið er at gera, bendir mangt á, at byggivirkið Smíðlist hjá Kára Kristiansen og Trygva Mortensen fær ríkiligt at gera teir næstu mánaðirnar*

**Í løtuni er byggivirkið Smíðlist í holt við útbygging av Strandaskúla og gongst, sum roknað verður við, fer felagið undir enn eina stóra verkætlan í næstum**

BYGGIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Stranda skúli verður í løtuni útbygdur við fleiri skúlastovum og goymsluhølum, og í desember mánaði í ár skal lidnað verkætlan sambært sáttmálanum handast kommununi.

Tað er byggivirkið Smíðlist, sum húsast í leigaðum hølum á Rituvíkarhálsi, ið stendur sum arbeiðstakari av hesi frægu verkætlan.

Fyritøkan húsast í stórum og góðum hølum á Rituvíkarhálsi, sum Frithleif Olsen í Rituvík eigur. Hetta er bygningurin, har Shell áður helt til, og sum nú verður brúktur til virksemið hjá elemenfyritøkuni.

Teir, sum eiga Smíðlist í dag, eru Kári Kristiansen og Trygvi Mortensen, sum í mong ár starvaðist í Timburhandlinum í Runavík.

Kári stovnaði Smíðlist í 2006, og í fjør kom Trygvi uppí fyritøkuna. Báðir eru teir virkandi stjórar í felagnum.

### Stór verkætlan

Trygvi Mortensen sigur, at skúlaverkætlanin á Strondum er fyrsta byggistig, sum verður bygt í forleinging av verandi fimleikarhøll.

- Her verða einar átta skúlastovur og goymsluhøli, og alt hetta er nýgerð.

Hann sigur, at talan er um eina uppíbygging, sum fevnir um einar 600 fermetrar í tveimum hæddum.

- Upprunaliga ætlanin hjá kommununi var, at nýggi til bygningurin skuldi verða í trimum hæddum, har niðasta hæddin partvís lá undir jørð, men ætlanin er síðan krympað til tvær hæddir.

Trygvi sigur, at fyritøkan hjá teimum hevur alla nýbyggingina av Strandaskúla undir hond, men teir hava havt JHR í Runavík at gera jørð-og kloakkarbeiði, og síðan hevur felagið Form á Skála staðið fyri betongarbeiðnum.

- Okkara partur verður so timbur-og snikkaraarbeiði, og nýbyggingin verður í fyrsta lagi reist við timburelementum, sum vit smíða í hølini á Rituvíkarhálsi. Stoypiarbeiði er komið væl áleiðis og arbeiðið, sum vit sjálvir skulu gera, er nú veruliga komið í gongd, leggur hann aftrat.

Trygvi Mortensen sigur, at aftat hesum, sum Smíðlist hevur ábyrgdina av, kemur eitt nú hita-og ventilatiónsarbeiði, el-arbeiði og málaraarbeiði, sum aðrir fara at taka sær av, tá tann tíðin kemur.

Samlaða verkætlanin við uppíbygging av Standa skúla fer helst at liggja um einar 16-17 miljónir krónur, harav parturin, sum Smíðlist ger og umsitir, fer at snúgva seg um einar 10 miljónir krónur.

### Onnur verkætlan

Sosialurin hevur frætt, at Smíðlist eisini hevur onnur arbeiði fyri framman, sum eru í stoypiskeiðini.

Trygvi Mortensen váttar, at so er, men sigur, at enn er eitt annað stórarbeiði, sum talan er um, ikki skrivliga komið uppá pláss.

- Mangt bendir á, at vit fáa hetta arbeiði at gera, men enn hava vit bara fingið tað at vita muntliga – og ikki skrivliga, leggur hann aftrat.

Nógv hevur verið frammi um, at byggivinnan í Føroyum ikki hevur tað gott í hesum tíðum, men alt bendir á, at Kári Kristiansen og Trygvi Mortensen við sínum fólki fáa úr at gera komandi mánaðirnar.

# Smíðlist góðar umstøður á Rituvíkarhálsi

**- Vit kunnu veita heildarloysnir, men vit kunnu eisini inniloka hús, so fólk kunnu taka sær av restini sjálvi og soleiðis spara nakrar krónur, sigur Trygvi Mortensen, sum er annar maðurin aftanfyri byggifyritøkuna Smíðlist**

BYGGIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Byggifyritøkan Smíðlist húsast í stórum og rúmligum hølum á Rituvíkarhálsi, har pláss bæði er innan-og uttandura.

Trygvi Mortensen, annar av stjórunum í fyritøkuni, sigur, at hølini eru einar 900 fermetrar, og grundøkið rundan um bygningin er einar 2500-3000 fermetrar.

- So, vit hava góðar umstøður og gott pláss at arbeiða á, bæði inni og úti, leggur hann aftrat.

### Nógvi møguleikar

Trygvi Mortensen sigur, at Smíðlist fær slett ikki so fáar fyrispurningar frá fólki, sum ætla sær at byggja sær sethús.

- Eg vil heldur siga, at vit hava fleiri fyrispurningar um sethúsabygging.

Hann sigur, at møguleikarnir hjá fólki, sum hugsa um at byggja, eru nógvir.

- Vit kunnu veita heildarloysnir, men vit kunnu eisini inniloka hús, so fólk kunnu taka sær av restini sjálvi og soleiðis spara nakrar krónur. Alt er møguligt, sigur Trygvi Mortensen.

Hann sigur, at Smíðlist eisini hjálpir fólki at tekna síni egnu hús, um tey ynskja tað.





*Umstøðurnar hjá byggifyritøkuni Smíðlist á Rituvíkarhálsi eru góðar, og felagið fær nógvar fyrispurningar um ymiskar sethúsaloysnir*